Diabetesfelagið

Hoyringarsvar frá Diabetesfelagnum um LM-025/2023 : Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin) (Heilivágsstigin verður broyttur)

Ætlaðu broytingarnar hjá samgonguni um almenna heilsutrygd kemur ómetaliga dátt við hjá Diabetesfelagnum, limum tess og teimum umleið 3.300 føroyingunum, sum hava kroniska diabetessjúku, og tí hava tørv á dagligum og lívsneyðugum heilivági.

Samgongan ætlar í lógaruppskotinum, at fólk, sum hava tørv á nógvum heilivági fyri at kunna liva og virka, skulu rinda nógv meira, áðrenn almenna Heilsutrygdin, sum tey eisini rinda til í dýrum dómum, tekur fult og heilt við.

Tilskotsstigan er ætlanin at gera nógv brattari, soleiðis, at sjúklingurin skal rinda nógv meira, áðrenn Heilsutrygd gevur íkast til kostnaðin av medisininum.

Í løtuni er støðan soleiðis, at sjúklingurin sjálvur rindar 500 krónur, áðrenn Heilsutrygd so smátt byrjar at taka við og veita íkast. 1. januar 2024 ætlar samgongan, at Heilsutrygd slett einki íkast skal veita, fyrr enn sjúklingurin sjálvur hevur rindað 1000 krónur. Hetta niðasta stigið á heilivágsstiganum verður sostatt tvífalt so høgt at klatra fyri sjúklingarnar.

Í løtuni er heilivágstilskotið 100 prosent frá Heilsutrygd, tá sjúklingurin hevur keypt medisin fyri tilsamans 5.300 krónur. Samgongan ætlar nú, at hetta loftið skal hækkast heilt upp í 8000 krónur, sum má sigast at vera eitt øgiligt lop skeiva vegin fyri hendan stóra bólk av sjúklingum.

Diabetesfelagið ávarar staðiliga ímóti at fremja slíka versnan av umstøðunum hjá fólki við kroniskum sjúkum, sum frammanundan hava nógv at stríðast við – ikki minst fíggjarliga.

Tá undanfarna samgonga ætlaði at gera skipanina við Heilsutrygd verri fyri kroniskt sjúk, sendi Diabetesfelagið eisini inniliga áheitan og ávaring til Trivnaðarnevndina ímóti at fremja skaðiligu broytingarnar.

Vit søgdu, at uppskotið fór at verða til óbótaligan skaða fyri fólk við diabetes og onnur við kroniskum sjúkum, sum tørva nógvan heilivág fyri at kunna liva og virka í samfelagnum, og at tað undir ongum umstøðum átti at verða samtykt. Undanfarna samgonga lurtaði tíbetur og tók lógarbroytingina aftur.

Diabetesfelagið vónar, at sitandi samgonga á sama hátt sum undanfarna samgonga vil lurta og taka uppskotið aftur.

Veruleikin er, at láglønt fólk við diabetes kunnu fara at skamta sín heilivág. Hetta er lívshættisligt og hevur stórar heilsuligar bágar við sær og eisini stóran – almennan - kostnað seinni vegna seinfylgjur.

Somuleiðis gjørdu fólk við diabetes vart við seg fyri nøkrum árum síðani og greiddu frá, at tað var svár fíggjarlig byrða at hava diabetes, og at tað mangan var trupult at hava ráð til heilivág. Serliga vóru tað ung fólk, sum stríddust við medisinrokningina.

Síðani tá hevur inflatiónin lagt sera stórar eyka byrðar á hesi somu fólk, sum tískil hava enn torførari við at svara hvørjum sítt, umframt at keypa sín neyðuga heilivág.

Við ætlanini hjá samgonguni nú at leggja stein oman á inflatiónsbyrðuna við at gera tilskotsstigan hjá Heilsutrygd øtiliga nógv brattari, bera vit ótta fyri, at almennu Føroyar koma til at skaða møguleikarnar hjá fólki við diabetes fyri at virka og liva so væl, sum tey annars høvdu kunnað við sínari kronisku sjúku.

Vit vilja eisini minna á, at fólk við diabetes – eins og allir aðrir borgarar í Føroyum – frammanundan rinda 175 krónur hvønn mánað til Heilsutrygd, og harumframt rinda tey 0,70 prosent av allari sínari skattligu inntøku til Heilsutrygd. Tá tey so haraftrat nú eftir ætlan skulu rinda 8000 krónur árliga fyri sítt lívsneyðuga medisin, áðrenn Heilsutrygd veitir fult tilskot, so er bogin spentur ov nógv.

Vegna Diabetesfelagið

May-Britt Skoradal, forkvinna